## Jákup á Borg ikki við móti Brøndby

Jákup á Borg og Tróndur Vatnhamar skiftu fyrr í vikuni frá HB til B36. Hetta fegnaðust leikarar og viðhaldsfólk hjá árstalsfelagnum í høvuðsstaðnum sjálvsagt um. Men hesi fólk mugu bíða eitt sindur enn, áðrenn tey fáa teir báðar at síggja á vøllinum. Jákup á Borg og Tróndur Vatnhamar eru ikki tøkir til dystin móti Brøndby, hóast spæliloyvini eru í ordan. Hetta tí, at báðir hava umboðað HB ímóti Elfsborg í Intertoto kappingini. Tað er nevniliga ikki loyvt at umboða fleiri enn eitt felag í altjóða kappingum, og tí sleppa teir ikki á vøllin fyrr enn landskappingin verður tikin uppaftur. Tað verður mikukvøldið 6. august, tá B36 vitjar í Sandoy.



## FM í olympisku kastigreinunum

Hvirlan úr Tórshavn skipar vegna FÍF fyri FM í teimum olympisku kastigreinunum um vikuskiftið. Leygardagin 26. juli verður byrjað við diskuskasti og spjótkasti, meðan kappast verður í hamarkasti og kúlustoyti sunnudagin 27. juli. Kappast verður eftir altjóða reglum, har øll fyrst fáa trý kast og síðan fáa átta tey bestu trý afturat. Kappingarnar fara fram á kastivøllinum við Eysturskúlan, og verður byrja kl. 14.00 báðar dagarnar. Kappingin er opin, tað vil siga at øll sum eru fødd í 1992 ella fyrr kunna luttaka.

B36 – Brøndby:

# Vónar at Brøndby fer víðari

**- Tað hevði kanska verið ein fyrimunur hjá okkum, um B36 sleppur víðari. Men eg vóni tað ikki. Brøndby er, saman við AGF, mítt felag, og eg ynski teimum alt tað besta, sigur Peter Foldgast, sum um aldarskiftið var millum stuðulsleikararnar hjá Brøndby**

UPPTAKT
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Ovari vøllur í Gundadali verður komandi hósdag karmur um seinna innleiðandi UEFA-CUP dystin millum B36 og Brøndby. Ein ávísur ótti er fyri eyðmýkingini, um tað ikki eydnaðst sigursvanda danska felagnum at vinna seg víðari í kappingini. Peter Foldgast, sum nú spælur við EB/Streymi, umboðaði felagið frá árunum 2000 til 2004. Og hóast hann í dag spælur í føroysku Formuladeildini, so vónar hann, at fyrrverandi felag hansara vinnur seg víðari í kappingini.

### Ansið eftir Súna

Peter Foldgast hevur higartil spælt tríggjar landskappingardystir fyri EB/Streym. Ein av hesum var júst ímóti B36 á útivølli í Gundadali. Danin staðfestir, at fyrrverandi felag hansara má ansa eftir Súna Olsen, sum átti týðandi leiklut í sigrinum hjá árstalsfelagnum, tá sundalagsmenn vitjaðu. Landsliðsleikarin var somuleiðis valdur til dagsins leikara, tá B36 vitjaði á Brøndby Stadion fyri góðari viku síðan.

- Hann stýrdi spælinum sera væl, tá vit vitjaðu í Gundadali. Honum má Brøndby hava eitt vakið eygað við. Eydnast at verja fyri hansara málgevandi sendingum, so trúgvi eg ikki, at B36 hevur stórvegis møguleikar at sleppa víðari, sigur Peter Foldgast.

Hann sær ikki stórvegis vansar í, at dysturin hevði leiktur á graslíki. Brøndby venur stóran partin av árinum á hesum undirlagnum, so tað er ikki nýtt fyri teir.

Er tað yvirhøvur møguleiki fyri, at B36 fer at vinna seg víðari?

- Tað er tað altíð. Eg trúgvi bara ikki, at teir gera tað. Í hópinum hjá Brøndby eru fleiri sera dugnaligir leikarar. Men eydnaðst tað B36 at halda teimum burtur frá upplagdum møguleikum, so dugi eg ikki at síggja, at tað ikki skal verða gjørligt. Føroyingarnir kunnu serliga hótta við deyðbóltsstøðum. Men eg vænti ikki, at tað B36 fer víðari, sigur Peter Foldgast.

### B36 má ikki víðari

Sigursvanda Brøndby er eitt av teimum stóru feløgunum í Danmark. Seinastu tvey árini hevur hinvegin gingið alt annað enn væl, og liðið er rapað niður eftir stigatalvuni, og eitt skifti vóru teir í niðurflytingarvanda. Undir leiðslu av Tom Køhlert slapp felagið undan fullkomnu eyðmýkingini, og nú verður aftur strembað eftir danska oddanum.

Peter Foldgast metir, at tað hevði verið eitt ógvusligt afturstig á leiðini, um tað ikki eydnaðist Brøndby at sleppa víðari ímóti lítla og føroyska B36.

- Eg dugi ikki at ímynda mær, hvat donsku miðlarnir høvdu sagt. Tað hevði verið ein vanlukka. Tað hevði eisini verið ræðuligt, tí Brøndby hevur alt annað enn tørv á keðiligari umtalu júst nú. So tað má ikki henda, sigur ein smílandi Peter Foldgast.

Brøndby fekk eina frálíka byrjan á donsku landskappingina, sum byrjaði aftur farna vikuskiftið. Á útivølli eydnaðst teimum at vinna 2-0 á FC Nordsjælland.

### Brøndby skal víðari

Peter Foldgast fekk sítt gjøgnumbrot í donskum fótbólti í júst Brøndby. Hann var ein av stuðulsleikarunum hjá Michael Laudrup, sum tá stóð á odda fyri liðnum. Tað eydnaðist teimum millum annað at vinna donsku steypakappingina, og Foldgast skjeyt eisini árins mál í SAS-liguni í 2004.

Kenslurnar fyri Brøndby eru alt annað enn fánaðar seinastu árini. Hjartað er í felagnum og vónar harvið eisini, at teir fara at vinna á B36 í Gundadali hósdagin.

- Tað hevði kanska verið ein fyrimunur hjá okkum, um B36 sleppur víðari. Men eg vóni tað ikki. Brøndby er, saman við AGF, mítt felag, og eg ynski teimum alt tað besta, staðfestir Peter Foldgast, sum nú fyrireikar seg við viðleikarunum í EB/Streymi til seinna undandystin á útivølli móti Manchester City.



*Peter Foldgast fekk sítt gjøgnumbrot í Brøndby, og skjeyt eisini árins mál í SAS-liguni í 2004*

*Mynd: Polfoto*

Manchester City – EB/Streymur:

# 200 føroyingar til Manchester

**Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, roknar við, at tað vera út ímóti 200 EB/Streymafjepparar, ið fara at sessast kring Oakwell Ground hósdagin, ið rúmar 23.000 áskoðarum**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tá Manchester City var í Føroyum í farnu viku, vóru um 300 áskoðarar frá Manchester og fylgdu liði teirra. Nú EB/Streymur fer til Onglands at spæla returdystin, vera føroysku áskoðararnir í Onglandi eisini nógvir í tali.

Eitt flogfar fer beinleiðis til Manchester, og tað er fullsett. 83 fólk eru við – 48 áskoðarar umfram leikarahópin og fólkini kring hann, ið telja 35 tilsamans.

Mánadagin fer ein bussur fullur av fjepparum. Tey eru 44 í tali. Harumframt eru tað eini 20 áskoðarar í flúgva umvegis Danmark til Onglands, og eini 15, ið taka túrin via London.

– Og so veit eisini um fleiri, sum fara við privatbili avstað, umframt føroyingar, sum koma aðrastaðni frá enn úr Føroyum, so eg trúgvi væl, at vit fara at nærkast teimum 200, tá alt kemur til alt, sigur formaðurin í EB/Streymi, Rólant Højsted.

### Alt er planlagt

Tá ferðalagið kemur til Onglands, verða leikarar og áskoðarar skyld sundur. Leikarar og fólkini, ið eru knýtt at honum, búgva á hotelli fyri seg í Barnsley, har dysturin skal spælast, meðan áskoðararnir búgva í Manchester.

Tá ferðalagið kemur mánadagin, hava leikararnir frá restina av degnum. Týsdagin eru tvær venjingar á skránni – einaferð beint eftir døgurða og einaferð um kvøldið. Tað sama er støðan mikudagin.

Hósdagin verður vant á Oakwell Ground, sum er leikvøllurin, har spælt verður á. Hetta verður gjørt fyrrapartin, meðan dysturin verður brikslaður í gongd kl. 19.00. Oakwell Ground er heimavøllurin hjá Barnsley og rúmar hann 23.000 áskoðarum. Orsøkin til, at spælt verður har og ikki á City of Manchester Stadium, er, at Bon Jovi hevði eina stóra konsert har fyri stuttari tíð síðani, og grasið skal hava tíð at koma fyri seg, áðrenn spælt verður á vøllinum aftur.

### Fríggjadagur er frídagur

Tað er tó ikki einans venjingar og dystur á skránni hjá EB/Streymi á Manchester-ferðini. Fríggjadagin sleppa leikararnir at taka sær av løttum. Tá er millum annað skipa fyri vitjan á Anfield Road, ið er heimavøllurin hjá Liverpool. Manchester City hevur eisini boðið EB/Streymi á vitjan á City of Manchester Stadium.

– Og tá vit síggja tann leikvøllin og eru í býnum annars, so giti eg mær til, at fleiri vilja síggja Old Trafford eisini, skemtar Rólant Højsted.